# Crewe áhuga fyri Rógva

**FÓTBÓLTUR** Fótbóltsfelagið Crewe Alexandra vísir nú Rógva Poulsen áhuga

Uni Holm Johannesen

Argjamaðurin og Odmar Færø hava royndarvant í felagnum seinastu vikurnar.

Dario Gradi, sum er venjari, sigur við enskar miðlar, at tað er ikki óhugsandi, at hann fer at hyggja nærri at Rógva Poulsen.

– Odmar Færø hevði ikki komið á liðið hjá okkum, men Rógvi Poulsen stóð seg væl, og vit fáa helst tørv á einum vongi í framtíðini, sigur Dario Gradi.

Crewe Alexandra spælir í fjórðbestu deildini í Onglandi.

*uni@sosialurin.fo*

# Vatnsdal hevur skrivað undir

Heini Vatnsdal, sum var millum mest eyðsýndu spælararnar hjá FC Suðuroy í hesum kappingarárinum, hevur bundið seg at barndómsfelagnum næstu tvey árini.

Heimasíðan hjá FC Suðuroy skrivað, at fleiri feløg hav asýnt verjuleikarunum áhuga, men Vatnsdal ætlar sær ongan veg.

Hann var eisini partur av U21-landsliðnum í farnu undankapping.

*uni@sosialurin.fo*

**LEYGARDAGIN, 4. DESEMBER:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | ÍF – TB | Kambsdalur | Klokkan 13.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | Neistin – VB | Tórshavn | Klokkan 14.30 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | KÍF – Fleyr | Kollafjørður | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | ÍF – SÍ | Kambsdalur | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | Ternan – TB | Toftir | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Neistin – KÍF | Tórshavn | Klokkan 16.00 | Menn |

**SUNNUDAGIN, 5. DESEMBER:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR | Stjørnan – StÍF | Klaksvík | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | VÍF – Tjaldur | Vestmanna | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | SÍ – Fleyr | Sørvágur | Klokkan 15.00 | Menn |
| FLOGBÓLTUR | Dráttur – Mjølnir | Giljanes | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | H71 – VÍF | Hoyvík | Klokkan 16.00 | Menn |

**MÁNADAGIN, 6. DESEMBER:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR | Team Klaksvík – StÍF | Klaksvík | Klokkan 19.15 | Menn |

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 10 | 298 | 239 | 59 | 18 |
| 2 | Tjaldur | 9 | 250 | 200 | 50 | 13 |
| 3 | Neistin | 9 | 249 | 223 | 26 | 13 |
| 4 | Kyndil | 10 | 247 | 228 | 19 | 10 |
| 5 | VB | 9 | 224 | 240 | -16 | 7 |
| 6 | VÍF | 10 | 238 | 287 | -49 | 4 |
| 7 | StÍF | 9 | 177 | 266 | -89 | 1 |

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 9 | 317 | 240 | 77 | 17 |
| 2 | KÍF | 9 | 262 | 218 | 44 | 15 |
| 3 | Kyndil | 9 | 236 | 224 | 12 | 10 |
| 4 | H71 | 9 | 246 | 242 | 4 | 10 |
| 5 | VÍF | 10 | 271 | 252 | 19 | 8 |
| 6 | StÍF | 8 | 18 | 196 | -11 | 4 |
| 7 | Team Klaksvík | 10 | 216 | 361 | -145 | 0 |

# Ovastu móti teimum niðastu




*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR** Stjørnan, Tjaldur og Neistin hava meira ella minni lagt sjógv millum seg og hini liðini. Ovastu liðini hava lættar dystir á pappírinum um vikuskiftið

Uni Holm Johannesen

Stjørnan spælir móti botnliðnum StÍF, sum hevur fingið eitt stig.

Tjaldur spælir í Vestmanna, har ungu kvinnurnar úr Vestmanna bjóða teimum vælkomnum.

Neistin spælir móti VB, sum tykist hava mist fótafestið.

Soleiðis sær umfarið út hesaferð.

Stigatalvan er farin í tvíningar, og ovast liðini skulu hesa ferð spæla móti teimum niðastu liðunum.

Um Stjørnan, Tjaldur og Neistin greiða sína skyldu, økist munurin bara niður til hini liðini.

Hóast hvørt lið bara hevur spælt um 10 landskappingardystir, er so at siga greitt, hvørji fara at stríðast um finaluplássini.

# Oddabrakið í Havn

**HONDBÓLTUR** Neistin hevur framvegis bara mist eitt stig í hesum kappingarárinum. Tí vóna hini liðini at greipuvinnararnir eisini vinna á KÍF í morgin

Uni Holm Johannesen

Neistin buldrar víðari og hevur beina kós í finaluna.

Teimum á bakið er KÍF.

Fimm stig skilja KÍF, nummar tvey, og Kyndil, nummar trý.

Neistin og KÍF spæla í høllini á Hálsi í morgin. Kyndil vil tí, at grannarnir vinna á kollfirðingununum, so grønlitta havnarliðið framvegis hevur samband við finaluplássini.

## Tætt í Hoyvík

H71 og VÍF spæla sunnudagin.

Bæði liðini hava verið í mótburði og viðburði í hessum kappingarárinum. Tað er júst tað, sum hevur eyðkent kappingina í ár. Øll hava tikið stig frá øllum.

H71 og VÍF hava nú tørv á aftur at fáa fult. Hoyvíkingar liggja betri fyri í løtuni, 10 stig, og vestmenningar, sum hava spælt ein dyst meira og hava átta stig, skulu tí vinna í Hoyvík hesaferð.

Team Klaksvík og StÍF spæla mánakvøldið.

*uni@sosialurin.fo*